# Samgongan heldur arbeiðsfólk fyri gjøldur

**– Skattalættin, sum samgongan ætlar at seta í verk, er sum at fáa ein vátan vøtt frammaná og hetta ein ein stór provokatión ímóti arbeiðsfólki, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað sum nýstovnaða samgongan ger, er heilt óhoyrt ímóti verkamannafjøldini, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

– Hetta er at halda arbeiðsfólk fyri tað turra spott.

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, er bæði bersøgin og avgjørdur, tá ið hann skal siga sína meining um skattalættan, sum samgongan ætlar at seta í gildi.

Tað, sum hann sipar til, er, at eftir ætlanini hjá samgonguni, verður tað tær góðu inntøkurnar, sum fáa tann størsta skattalættan.

Hinvegin fær ein vanlig arbeiðaraløn lítið og onki í skattalætta.

– Hetta er sum at fáa ein vátan vøtt í andlitið, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Og við týðiligari tilvísing til javnaðarflokkin spyr hann, hvar arbeiðaravinirnir nú blivu av?

Men sostatt kann staðfestast, at longu fysta dagin hendan samgongan sat, kom hon upp á tvørs av einum parti av fakfelagsrørsluni....

### Smalastu herðarnar bera tyngri byrðar

Hans Joensen heldur, at hesin skattalættin, sum nú er fráboðaður, samsvarar als ikki við slagorðini hjá javnaðarflokkinum um at tær breiðastu herðarnar skulu bera tær tyngstu byrðarnar.

– Her er tvørturímóti talan um, at leggja tyngri byrðar á tær smalastu herðarnar. Tey, sum dragsa vognin, mugu ikki hava meir fyri at dragsa.

Og Hans Joensen stúrir fyri, at hetta fer at hevna seg aftur við fleiri avgjøldum av ymsum slagi.

– Nú gjarar samgongan út við høgru hond til tey, sum frammanundan forvinna nógv. Men eg stúri fyri, at tá ið hon fer at taka avgjøld innaftur við vinstru hond, verða tað vit, sum koma at betala líka nógv sum hini. Og eitt vita vit og tað er, at avgjøld venda tann tunga endan niðureftir, tí ein høg inntøka hevur nógv betri ráð til at betala avgjøld enn ein lág inntøka.

### Torpederar alt tos um lønarafturhald

Hans Joensen hevur verið heitur talsmaður fyri at fakfeløg og arbeiðsgevarar taka upp samráðingar við landsstýrið um at halda aftur við lønarkrøvum, afturfyri at fáa skattalætta.

– Verður hetta skattapolitikkurin hjá samgonguni, kann hon gloyma alt um samstarv við fakfeløgini, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

– Verður hetta skattalættin hjá samgonguni, hevur hon við fríum vilja saboterað royndirnar og viljan hjá fakfeløgum til at gera sítt til at fáa samfelagsskútuna á beint aftur.

Hann sigur, at hann hevur onki ímóti, at fólk fáa skattalætta.

– Men tað, sum nýstovnaða samgongan nú er komin við, er heilt óhoyrt ímóti verkamannafjøldini, sigur Hans Joensen at enda.

# Ingeborg Vinther vónbrotin

**– Er tað rætt, sum vit hava sæð og hoyrt um ætlaða skattalættan hjá samgonguni, er tað eitt satt vónbrot, sigur Ingeborg Vinther**

SKATTALÆTTI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ingeborg Vinter heldur, at skattalættin, sum samgongan hevur borðreitt við, boðar ikki frá góðum*

– Hetta boðar ikki frá góðum.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, er ógvuliga vónbrotin av tí, hon hevur sæð og hoyrt um ætlaða skattalættan hjá nýstovnaðu samgonguni.

Men hon leggur dent á, at hon hevur ikki tosað við samgonguna og hon hevur heldur ikki sæð útrokningarnar. So tað, hon veit um skattalættan, byggir bara á tað, sum hon hevur frætt úr ymsum fjølmiðlunum.

– Men er tað rætt, sum er borið fram í fjølmiðlunum, er tað eitt satt vónbrot, sigur hon.

### Boðar ikki frá góðum

Hon heldur, at hetta boðar ikki frá, at ætlanin er at geva skattalætta, har sum skattalætti er harðast tiltrongdur og tað er hjá teimum lágu inntøkunum og tað er hon ógvuliga vónbrotin av.

– Eg hevði væntað, at hendan samgongan fór at hugsa meiri um tað vanliga fólkið, men tað tykist ikki so eftir tí, sum higartil er komið fram.

– Hetta er sami fíggjarpolitikkur, sum undanfarna samgonga førdi, tí hon hugsaði bara um loysing og tað hevði eg ikki væntað av hesi samgonguni.

– Tað sum eg væntaði útfrá tí, eg havi hoyrt frá øllum flokkum í valstríðnum, varð, at ein skattalætti skuldi tað koma lág- og miðalinntøkunum til góðar. Tað var hetta, sum eg væntaði og tí er tað, sum nú er komið fram, eitt vónbrot,.

– Er ætlanin bara at lívga tær góðu inntøkurnar og gloyma lág- og miðalinntøkurnar, er hendan samgongan ikki petti frægari enn tann, sum nú er farin frá.

### Rætt at broyta marginalskattin

Kortini heldur Ingeborg Vinther, at tað er neyðugt at broyta marginalskattin, so tann partin av skattapolitikkinum hjá samgonguni, tekur hon undir við.

– Sum er, betala sjálvt vanlig arbeiðsfólk toppskatt av teimum seinastu krónunum og tað er rætt, at samgongan broytir tað, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.

Ingeborg Vinther tekur undir við formanninum í Havnar Arbeiðsmannafelag um, at hetta stimbrar ikki uppundir tankan um fakfeløgini skulu avmarka lønarkrøvini, fingu tey ein munagóðan skattalætta afturfyri.

Hon er ein av teimum fakfelagsleiðarunum, sum hava luftað tankan um, at fáa verkafólk ein skattalætta sum munar, kann tað umhugsast at halda aftur í lønarkrøvunum, men beinleiðis lønarsteðg, vil hon ikki hoyra talan um.

– Tað, sum er komið fram um skattalættan, eggjar ikki til nakað slíkt, sigur Ingeborg Vinther.

*Meiri er á síðu 16*



# Ársavlopið lækkað hjá Norðoya Sparikassa

**Á nevndarfundi varð roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa viðgjørdur og góðkendur av nevndini. Hann vísir, at avlopið hjá sparikassanum er lækkað við 3,8 milliónum krónum**

ROKNSKAPUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Ársavlopið hjá Norðoya Sparikassa er lækkað við 3,8 milliónum krónum í mun til 2002. Men stovnurin er vælnøgdur við úrslitið kortini*

**Klaksvík:**
Á nevndarfundi tann 3. februar varð roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa 2003 viðgjørdur og góðkendur. Eftir at hava havt met í avlopum í fleiri ár á rað, vísir roknskapurin fyri 2003 eitt lægri avlop eftir skatt enn í 2002. Avlopið eftir skatt er upp á 17,5 milliónir krónur, tað vil siga 3,8 milliónir lægri enn avlopið í 2002, sum var 21,3 milliónir.

Høvuðsorsøkin til at avlopið er lægri í fjør enn fyrra árið, kann sigast at vera tapið í virðsjavnanum. Sparikassin hevði í 2003 eitt tap av virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra uppá 1,3 mió. kr., móti einum vinningi í 2002 uppá 3,1 mió. kr.

Um hugt verður at inntøkunum og útreiðslunum, so sást at bæði eru økt, men inntøkurnar eru øktar meira enn útreiðslurnar. Økingin í útreiðlsunum var 2 % frá 28,7 upp í 29,4 milliónir krónur. Samstundis øktust inntøkurnar úr 55, 8 upp í 57,5 milliónir krónur.

Somuleiðis eru bæði innlán og útlán økt. Innlánið við 5% og útlánið við 12%, og tann gongdin samsvarar við gongdina hjá peningastovninum, sum hevur verið seinnu árini.

### Eginpeningur og fíggjarstøða

Eginpeningurin vaks við 8,% úr 224 í 2002 til 242 milliónir krónur í 2003. Hann er nú 20,6% av samlaðu fíggjarstøðuni pr. 31.12.2003, móti 20,1 % pr. 31.12.2002.

Fíggjarstøðan hjá Norðoya Sparikassa javnvigaði tann 31.12.2003 við 1.178.

Hetta svarar til ein vøkstur uppá 6% í mun til 31.12.2002, tá fíggjarstøðan javnvigaði við 1.115 milliónum krónum.

Norðoya Sparikassi er vælnøgdur við úrsltitið, hóast avlopið er lægri enn í 2002.

– Avlopið er lækkað av orsøkum, sum vit ikki hava nakra ávirkan á. Gongdin seinnu árini hevur eisini verið so mikið góð, serliga árið 2002 var gott, og tað vistu vit fór at verða torført at halda framvið. Men vit eru avbera vælnøgd við ársúrslitið, sigur Marner Mortensen, fyrisitingarleiðari í Norðoya Sparikassa.

Roknskapurin verður lagdur fram á aðalfundi peningastovnsins, sum verður í Klaksvík týsdagin tann 24. februar klokkan 15.

# Arbeiðið borðoyarmegin byrjað

**Nú er arbeiðið til Norðoyartunnilin farið í gongd borðoyarmegin**

NORÐOYATUNNIL
*Solby A, Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Týsdagin fór arbeiðið upp á vegagerðina til inntakið til Norðoyatunnilin borðoyarmegin í gongd*

**Klaksvík:**
Vegagerðin til inntakið til Norðoyatunnilin er nú farið í gongd borðoyarmegin. Arbeiðið byrjaði týsdagin. Dávur Reinert Hansen, stjóri í pf Norðoyatunnilin sigur, at nú verður fyrst grivið út fyri tunnilsmunnanum, og síðani verður farið at spreingja út fyri inntakinum. Byrjað verður at bora borðoyamegin frá í apríl.

Arbeiðið hinumegin fjørðin gongur væl, men eitt sindur striltið hevur tað kortini verið, tí at lendið hevur verið leyst, men nú er so væl komið inn og tilfarið tað betur, at roknað verður viðat full kraft verður sett á boringina Leirvíksmegin frá um heilt stutta tíð.

Veðrið hevur ikki verið tilvildar í eina tíð nú við nógva kavanum, sum hevur ligið. Hetta hevur so somuleiðis gjørt sítt til, at arbeiðið borðoyarmegin ikki er farið í gongd. Men nú er hann so burtur, og arbeiðið fór í gongd beinanvegin.

Sum sagt verður farið í holt við at bora inn í fjallið, tá hetta arbeiðið er liðugt. Og gongur alt, sum ætlað, so hittast teir, sum arbeiða hvør sínu megin fjørðin, onkrastaðni undir Leirvíksfirði um eini tvey ár ella gott tað.

Og at norðoyingar eru spentir, tað sást týðuliga, tí nógvir bilar koyra framvið fyri at forvitnast.

# Maður framvegis horvin

**Løgreglan leitar framvegis eftir tí 54 ára gamla Jens Kartna Justinussen úr Leirvík. Hann er ikki sæddur í eina viku nú**

LØGREGLUTÍÐINDI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Jens Kartni Justinussen úr Leirvík, búsitandi í Havn, hevur verið horvin í eina viku. Hann var seinast sæddur, tá hann fór frá foreldrum sínum í Leirvík, har hann hevði verið og vitjað. Hann setti seg í bilin og skuldi koyra aftur til Havnar. Síðani tað er hvørki maðurin ella bilurin sæddur.

Løgreglan veit ikki, um hann kom aftur til Havnar, tí hon hevur ikki fingið nakra fráboðan um, at maðurin er sæddur aftur í Havn ella aðrastaðni, og tískil er tað sera torført hjá løgregluni at leita.

– Vit vita onki um, hvar vit skulu leita. Men vit royna at gera okkara besta, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Havn og leggur afturat, at tað hevur somuleiðis ikki verið lætt at leita orsakað av tí nógva kavanum, sum hevur ligið í eina viku nú.

– Tað er ikki lætt at fáa eyga á ein hvítan bil í nógva kavanum, sigur vakthavandi.

Bilurin hjá Jens Kartni er ein hvítur Mazda 323 hatchback við nummarspjaldrinum F 79104.

Løgreglan heitir á fólk, sum halda seg hava upplýsningar, sum kunnu vera til hjálpar at seta seg í samband við løgregluna. Tað kann gerast við at ringja tlf 351448.



*Livar Nysted úr Hvannasundi hevur listaframsýning í Leikalund í februar mánaði*

# Livar Nysted í Leikalund

**Í februar mánaði hevur Livar Nysted úr Hvannasundi listaframsýning í Leikalund**

TÍÐINDASKRIV
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Listamaðurin úr Hvannasundi er 33 ára gamal og hevur seinastu 10 árini ár roynt seg við málningalist. Hann hevur fyrr haft framsýningar millum annað her í Klaksvík á Kósini og í Føroya Banka og hevur eisini verið við á Norðoyastevnu framsýningini. Seinasta summar hevði hann framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Við á framsýningini hevur Livar umleið 20 akryl málningar við ymiskum myndaevnum, m. a. landslagsmyndir og persónsmyndir.

Framsýningin letur upp fríggjadagin 6. februar klokkan 16.00, har øll eru hjartaliga vælkomin at hyggja inn, síggja framsýningina og fáa ein kaffimunn. Myndirnar eru til sølu og eru at síggja í vanligari upplatingartíð frá mánadag til fríggjadag frá 10 til 17:30 og leygardag frá 10 til 13. Framsýningin verður hangandi allan februar mánað.

Framsýningin, ið tekur við aftaná Livar, verður við myndum hjá Sigrun Gunnarsdóttir Niclasen. Hon sýnir fram í Leikalund í mars mánað.